# Læraradagur í Norðurlandahúsinum
# 18. og 19. februar 2020

Heitið á ráðstevnuni er **Lærdómur er lættur at bera**, og evnið er **læring í 21. øld.**

Dagurin verður skipaður við trimum felags framløgum í høllini og fimm verkstovum, sum vera í øðrum hølum í húsinum. Hvør luttakari skal melda seg til eina verkstovu. Tilmeldingin verður talgild og byrjar í viku 3. Teldupostur við tilmeldingini verður sendur luttakarunum fyrst í januar.

Skráin:

| | |
|---|---|
| 8.00 | Innskriving og morgunmatur |
| 9.00 | **Vælkomin**<br>Eyðun Gaard, stjóri í Námi, og Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum |
| 9.30 | **Felags fyrilestur 1**<br>At læra fyri at liva í 21. øld, Lene Tanggaard (DK) |
| 10.15 | Kaffisteðgur |
| 10.45 | **Felags fyrilestur 2**<br>Um sansaupplivingar í læring, Theresa Schilhab (DK) |
| 11.30 | Døgurðasteðgur |
| 12.30 | **Verkstovur 1-5** |
| 13.15 | Kaffisteðgur |
| 13.45 | **Felags fyrilestur 3**<br>Arbeiðsminni, Michael Wahl Andersen (DK) |
| 14.30 | **Hugleiðing og skemt**<br>Jensina Olsen |
| 14.50 | **Samanumtøka** |

Hesir skúlar luttaka **týsdagin 18. februar**: Á Skúlatrøð, Eiðis skúli, Eysturskúlin, Frískúlin Keldan, Fuglafjarðar skúli, Haraldsunds skúli, Hósvíkar skúli, Húsar/Syðradals skúli, Hvalvíkar skúli, Kaldbaks skúli, Kirkju/Hattarvíkar skúli, Kunoyar skúli, Kvívíkar skúli, Skúlin á Argjahamri, Skúlin á Fossánesi, Skúlin á Giljanesi, Skúlin í Eysturkommunu, Skúlin við Løgmannabreyt, Skúlin við Streymin, Sørvágs skúli, Velbastaðar skúli, Vestmanna skúli og Viðareiðis skúli.

Hesir skúlar luttaka **mikudagin 19. februar**: Dugni, Fámjins skúli, Frískúlin í Havn, Hoyvíkar skúli, Hvalbiar skúli, Kollafjarðar skúli, Lítliskúli, Nólsoyar skúli, Oyndarfjarðar skúli, Porkeris skúli, Runavíkar kommunuskúli, Sandoyar Meginskúli, Sands skúli, Sankta Frans skúli, Skála skúli, Skálavíkar skúli, Skopunar skúli, Skúlin á Fløtum, Skúlin á Trøðni, Stranda skúli, Sumbiar skúli, Tofta skúli, Tvøroyrar skúli og Vágs skúli.

**GG!! Parkeringsviðurskifti**
Mint verður á, at parkeringsplássini við Norðurlandahúsið eru avmarkað, og ofta kann tað vera torført at finna parkeringspláss í sambandi við størri tiltøk. Tí verður víst til almennu parkeringsplássini, sum eru nærhendis, eitt nú við Tórsbreyt, Ítróttarhøllina og í Gundadali.

NÁM

**Fyrilestur 1** (9.30 -10.15 í høllini)

## At læra fyri at liva í 21. øld

Lene Tanggaard (DK), professari, ph.d., rektari á Designskolen Kolding

Nógv eru boðini um, hvat framtíðin hevur í væntu, og hvat okkara børn og ungu eiga at duga í 21. øld. Hvør lærdómur verður týdningarmestur? Lene Tanggaard fer í sínum fyrilestri serliga at savna seg um tær skapandi lærutilgongdirnar, sum snúgva seg um at seta spurningar, at undrast, at kanna o.s.fr. Kritisk og skapandi hugsan og royndir eru grundleggjandi, óansæð um tað snýr seg um talgildisbúgving, at skapa ella at tilogna sær vitan og førleikar. Neyðugt er at skilja skapanarevni og nýmenning. Eisini eiga vit hvør sær at gera upp við gamlar vanar, eitt nú tá vit arbeiða við skapanarevnunum hjá børnum og ungum og í summum førum eisini viðvíkjandi okkara tilgongd til undirvísingina.

**Fyrilestur 2** (10.45 -11.30 í høllini)

## Um sansaupplivingar í læring

Theresa Schilhab (DK), professari, neurobiolog, ph.d., Aarhus Universitet

Nýggjar granskingar innan fatanarsálarfrøði og nervavísindi vísa, at hugsan og vitan eru tongd at sansamotoriskum og kensluligum tilgongdum. Hugtaksliga vitanin um ítøkiligar lutir er m.a. grundað á tev-, smakki- og sjónupplivingar og á, hvussu lutirnir følast, og hvønn kensluligan týdning teir vekja. Kropsligar royndir og sansir okkara eru sostatt avgerandi fyri sinnislig virki, sum t.d. málsliga menning og fatan. At kalla øll læring er sett saman av sansamotoriskum og kensluligum tilgongdum, sum verða samanbundnar við endurtøku. Saman við siðbundnari undirvísing kunnu slíkar tilgongdir fremja djypri læring og fatan.

**Fyrilestur 3** (13.45 -14.30 í høllini)

## Arbeiðsminni

Michael Wahl Andersen (DK), lektari í støddfrøði og sálarfrøði á Københavns Professions Højskole

Nógvir granskarar eru á einum máli um, at arbeiðsminni er týðandi fyri, hvussu næmingar klára seg í undirvísingini. Hesin fyrilesturin tekur støði í leiklutinum, sum arbeiðsminni hevur í sambandi við læring. Arbeiðsminni kann skilmarkast sum eitt avmarkað goymsluminni, sum sameinar fyribilsgoymslu og fatan. Arbeiðsminni hevur týdning í sambandi við at loysa torskildar uppgávur, sum fevna um hugsan, fatan, hugtakslæru og úrtøkiliga hugsan.

Í fyrilestrinum verður komið inn á, hvussu arbeiðsminni kann skiljast, og hvønn týdning tað hevur fyri læring. Komið verður eisini inn á, hvussu ein lærari kann fyrireika sína undirvísing, sum skal taka støði í læringini hjá næminginum.

<u>**Verkstovur 1 - 5** (12.30-13.15)</u>

**Verkstova 1:**

## Náttúruupplivingar og tøkni

Theresa Schilhab (DK), professari, neurobiolog, ph.d., Aarhus Universitet

Nýggj heilagransking vísir, at hugsan og vitan í stóran mun eru grundaðar á ítøkiligar kropsligar og sosialar upplivingar, sum vit fáa gjøgnum alt lívið. Nógv bendir tó á, at serliga náttúruupplivingar ávirka okkum. Hvør er munurin á upplivingum av menniskjaskaptum lutum og av náttúruni? Og gevur hetta okkum eina ábending um, hvørja ávirkan vaksandi nýtslan av tøkni hevur á læring og hugsan?

NÁM

**Verkstova 2:**

## Faklig lesing í støddfrøði

Michael Wahl Andersen (DK), lektari í støddfrøði og sálarfrøði á Københavns Professions Højskole

Faklig lesing snýr seg vanliga um at lesa fyri at læra. Lesing er ein meiningsskapandi tilgongd, sum krevur, at næmingarnir eru virknir í lesingini. Men hvat merkir hetta? Hendan verkstovan snýr seg um hendan spurningin. Hvussu verður meining skapað í tekstum, sum snúgva seg um støddfrøði?
Fyri at skilja tað, ið lisið verður í støddfrøðisbókunum, er neyðugt at duga at skapa ein samanhang millum ymsu merkingarnar. Verður okkurt lisið ella tulkað skeivt, er skjótt, at alt verður misskilt.
Í verkstovuni verður hugt eftir, hvat lesing og faklig lesing snúgva seg um, og eisini hvussu undirvísingin kann skipast, fyri at næmingar gerast til virknar lesarar, tá teir lesa í støddfrøðisbókum.

**Verkstova 3:**

## Kropsligar rørslur og læring

Súni Olsen (FO), fólkaskúlalærari, Skúlin í Eysturkommunu

Hugt verður eftir, hvussu kropsligar rørslur og læring kunnu samvirka. Komið verður bæði inn á ástøðiligar hugleiðingar og niðurstøður og á praktiskar upplivingar og royndir á økinum. Endamálið er at greiða frá ymiskum arbeiðsháttum, umframt at vísa á dømi í undirvísingini, har rørslur eru partur av læringini.

**Verkstova 4:**

## Avbjóðingar hjá lesiveikum næmingum í undirvísingini

Fríðbjørg Hammer (FO), fólkaskúlalærari, Kaldbaks skúla

Í verkstovuni verður greitt stutt frá ástøði um lesing og lesitrupulleikar. Eisini verður komið inn á týdningin av testum, og hvussu tær kunnu knýtast til sjálva undirvísingina. Komið verður eisini inn á spurningin, um munur er á undirvísingini, tá tosað verður um lesiveikar næmingar og næmingar við orðblindadiagnosu. Nær er neyðugt at seta inn, og er neyðugt við dokumentatión?
Víst verður á, hvussu undirvísingin kann leggjast til rættis, so næmingurin fær ágóðan av serundirvísingini við inn í flokkin. Komið verður í hesum høpi eisini inn á, hvat skal til, fyri at hetta skal eydnast, og næmingurin kennir seg sum ein part av flokkinum, bæði fakliga og sosialt.

**Verkstova 5:**

## Norð – norðurlendsk samvirkin skaldsøga

Camilla Hübbe (DK), rithøvundur

Camilla Hübbe hevur skrivað samvirknu skaldsøguna ”Norð”. Skaldsøgan fæst bæði í pappírsútgávu og í samvirknari útgávu, sum verður lisin á teldli ella teldu. Hon vendir sær til hádeild fólkaskúlans og vísir seg at vera serliga væl egnað til børn, sum antin hava lesitrupulleikar ella hava lítlan hug at lesa. ”Norð” snýr seg um veðurlagsbroytingar og tekur støði í norrønu gudalæruni og Vøluspá, sum spáar um eitt nýtt Ragnarok. Bókin er skrivað á donskum og týdd til føroyskt, íslendskt, svenskt, norskt og enskt. Hetta, saman við evninum, ger bókina vælegnaða í nógvum ymiskum lærugreinum, t.d. føroyskum, donskum, enskum, søgu og samtíð, átrúnaði.

Í verkstovuni fer Camilla Hübbe at leggja fyri við ”Norð” og serliga umhvørvinum í skaldsøguni. Eftir hetta verður høvi til at arbeiða við hugskotum um, hvussu ein sjálvur kann arbeiða við samvirknu skaldsøguni í undirvísingini.